# Danskt undur í Portugal

Danir vóru aftanfyri 2-1, tá ið tað restaðu tveir minuttir av dystinum ímóti Portugal. Teir vunnu tó 3-2. Portugal var í stórum løtum betra liðið í HM-dystinum ímóti Danmark mikukvøldið. Heimaliðið kom eisini á odda við máli frá Nani. Men seks minuttir fyri leiklok eydnaðist dønum at javna við máli frá Nicklas Bendtner. Gleðin var tó stokkut, tí tveir minuttir seinni skoraði Deco við brotssparki, og so var Portugal aftur á odda 2-1. Men danir góvu ikki skarvin yvir. Tveir minuttir fyri leiklok skoraði Christian Poulsen eftir hornaspark, og í yvirtíðini tryggjaði Daniel Jensen Danmark sigurin við einum langskoti, sum rakti minst ein portugisiskan verjuspælara, áðrenn bólturin fór í málið. So vóru danir á gosi, og teir hava - nakað óvæntað - øll trý stigin við sær heimaftur til Danmarkar.





*Tað var um reppið, at Christian Høgni Jacobsen fekk fyrsta føroyska málið í undankappingini*
*Mynd: Álvur*

# Tíðin var knøpp

**Christian Høgni Jacobsen átti vandamestu føroysku royndina, tá hann brádliga kom at standa einsamallur móti rumenska málverjanum. – Tíðin var knøpp at hugsa seg í, sigur runavíkingurin**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Christian Høgni Jacobsen var í seinastu løtu nær við at javna fyri Føroyar, tá hann var fyrstur á afturspæling. Men úr spískum sendi hann beint í kropsskinnið á málverjanum.

- Alt hendi so skjótt. Eg kom ímillum, tá hann skuldi spæla aftur til málverjan, men tíðin var knøpp at hugsa seg í. Eg royndi at lyfta bóltin upp um hann, men tað eydnaðist so ikki.

Tit hava nógv positivt at taka úr hesum dystinum?

- Avgjørt. Hugburðurin var sera góður. Tað var sera trupult at fáa ferð á bóltin í fyrra hálvleiki, men teir vóru eisini ótrúliga bólttryggir. Men avrikið í dag gevur alíkavæl góðar vónir til dystin móti Eysturríki, sigur Christian Høgni Jacobsen.

# Vit eru vónbrotnir

**Atli Danielsen staðfestir, at hóast fleiri av lyklaleikarunum vóru burtur, so vóru teir vónbrotnir um tepra ósigurin**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

- Jú, vit eru vónbrotnir.

Atli Danielsen var harmur um, at tað ikki eydnaðist føroyingunum at fáa stig burtur úr dystinum. Hann staðfestir, at nýggja uppleggið riggar, og vónirnar avgjørt eru góðar til dystin móti Eysturríki í komandi mánað.

- Vit kundu kanska at lagt trýstið eitt sindur áðrenn. Vit eru vandamiklir seinastu løtuna, men tað er ov seint. Men tað er lætt at siga nú.

Dysturin í Serbia mikukvøldið, hann sat kanska eisini í beinunum?

- Eg kann so bara svara fyri mítt viðkomandi, og eg merki hann í øllum førum, sigur Atli Danielsen.



*Atli Danielsen staðfestir, at nýggja uppleggið hjá landsliðnum fer at geva úrslit*
*Mynd: Álvur*

# Trýstu ov seint

**Innskifti Andrias Lava Olsen sigur, at føroyska trýstið kom ov seint**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Andrias Lava Olsen, sum var innskiftur fyri Andrew av Fløtum, tá góðir tjúgu minuttir restaðu, heldur, at føroyingarnir skuldu byrjað trýstið á rumenarnar áðrenn.

- Vit eru ov seinir. Teir fáa ein mann útvístan tíðliga í seinna hálvleiki, og tá eru møguleikin fyri stigi avgjørt góðir.

Hvussu var at koma inn í ein tílíkan dyst sum einsamallur framherji?

- Tað var torført, og tað tekur altíð nakrar minuttir at koma fyri seg. Men eg eri nøgdur. Føroyska landsliðið má dúva upp á skjótálop, og tí er tað sjálvsagt, at tú verður eitt sindur einsamallur. Men vit stríddust væl, og stuðlaðu hvørjum øðrum, sigur Andrias Lava Olsen, sum hevur góðar vónir at vinna sær pláss í byrjunaruppstillingin.